# Tøkningur

til

## Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

Á HTM er eitt fulltíðar starv sum tøkningur leyst at seta sum skjótast.

HTM er deild Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 11 fólk á HTM.

**Uppgávurnar hjá HTM umfata m.a.**
- upplýsing, ráðgeving og leiðbeining til brúkarar, almennar myndugleikar o.o. um hjálpartól og byggi- og bústaðarspurningar
- útlán og endurnýtsla av hjálpartólum
- viðgerð og støðutakan til umsóknir um sertillagað hjálpartól, bústaðarbroytingar og avlamisbilar
- tvørfakligt samstarv - innan- og uttanhýsis

**Starvið fevnir m.a. um:**
- meting um tøkniligarloysnir
- fremjing av tøknuligum loysnum
- meting um dygd av hjálpartólum
- skipa fyri umvælingum av hjálpartólum
- heimavitjanir saman við terapeutum
- ráðgeving í sambandi við íbúðarbroytingar
- størri tillagingar av hjálpartólum saman við terapeutum
- viðlíkarhald av eykalutagoymslu
- fyrisitingarligar uppgávur

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur:**
- viðkomandi útbúgving
- breiða tøkniligan vitan
- áhuga at arbeiða við hjálpartólum
- góð samstarvsevnir
- evnir at arbeiða sjálvstøðugt
- hollan telduførleika

**Vit kunnu bjóða:**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- nýggja tøkni
- tætt samstarv við starvsfelagarnar
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen leiðara á HTM tel. 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 21. februar 2003 kl. 14.00.

## Vegna skeiðvirksemi er handilin stongdur frá fríggjadegi 21. februar opið verður aftur 3. mars

men bíleggjast kann á:
tel. 212676 ella fax 318101

**A. H. Jensen**
alt innan reingerð
Stoffalág 25 • FO-100 Tórshavn
tlf.: 322676 • fax: 318101
e-mail: a_jensen@post.olivant.fo

Sosialurin • 311820

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktar-frøðingar

Hesi avloysarastørv sum sjúkrarøktarfrøðingur á **B7** eru leys at søkja:

- á starvsbrøki 0,6 í skiftandi vaktum frá 1. mars 2003 ella eftir avtalu, til og við 29. februar 2004
- fulltíðarstarv í skiftandi vaktum frá 1. mars 2003 ella eftir avtalu, til og við 31. juli 2003
- á starvsbrøki 0,8 í skiftandi vaktum frá 1. mai 2003 ella eftir avtalu, til og við 31. oktober 2003

Deildin hevur 15 seingjapláss og tekur sær av sjúklingum við m.a. onkologiskum-, nýra-, lungagikta- og ryggjasjúkum v.m.

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan medicinska røkt og viðgerð
- góð samstarvsevni

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Evu Mortensen, deildarleiðara á **B7**, telefon 31 35 40, lokal 107 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðingur, lokal 300, e-post asap@ahs.fo.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 28. februar 2003 kl. 12.00

# Umboðsmannaval

Samb. grein 28 í høvuðssamtyktini verður val av umboðum til sjúkrakassan.

Veljast skulu: eitt umboð fyri Skopun, eitt fyri Sand og eitt fyri Húsavík/Dal.

Uppskot skulu skrivliga vera sjúkrakassanum í hendi innan 15. mars.

**Sandoyar Sjúkrakassi**

# Limafundur

Eysturoyar Javnaðarfelag hevur limafund í E.B.-húsinum á Eiði mikudagin 19. feb. kl. 20.00.

Við á fundinum verða Andrias Petersen, Henrik Old og Gerhard Lognberg.

**Nevndin**

# Málsviðgeri

til

## Hjálpartólamiðstøðina (HTM)

Á HTM eitt fulltíðarstarv sum málsviðgeri leyst at seta sum skjótast.

HTM er deild av Almannastovuni og umsitur hjálpartól, umbyggingar í heiminum og avlamisbilar til fólk, ið bera brek. Í løtuni starvast 11 fólk á HTM.

**Arbeiðsuppgávurnar fevna m.a. um**
- málsviðgerð
- útrokningar av veitingum
- skrivarauppgávur
- journalisering
- móttøku og telefonavgreiðslu
- annað fyrisitingarligt arbeiði

**Vit sóknast eftir einum starvsfelaga sum hevur:**
- skrivstovuútbúgving, HH ella aðara fyrisitingarliga útbúgving
- royndir innan almenna fyrisiting
- góð samstarvsevnir
- evnir at arbeiða sjálvstøðugt
- góðan málburð í føroyskum, bæði munnliga og skrivliga
- hollan telduførleika
- kunnleika til journalisering (DocuLive) er ein fyrimunur
- kunnleika til C5

**Vit kunnu bjóða:**
- sjálvstøðugt arbeiði
- flextíð
- nýggja tøkni
- samskifti við viðskiftafólk
- fakligt mennandi umhvørvi

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Palla Mortensen, leiðara á HTM tel. 358300.

Umsókn við avriti av viðkomandi skjølum skal sendast til Hjálpartólamiðstøðina, Postboks 1049, 110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 21. februar 2003 kl. 14.00.

# Neytakjøt

Kjøt til sølu fyri kilo 26,- kr. til 28 kr.

**Áhugað kunnu ringja 311961 helst eftir kl. 18**






# Góðir brúktir bilar

| Bilur | Lýsing | Prísur |
|---|---|---|
| Nissan Micra 1.0 GX | bláur, árg. 2000. 5 hurðar, km. 22.000 | 92.000 |
| Opel Astra 2.0 Dti | reyður, árg 2000, 4 hurðar, km. 85.000 | 146.000 |
| Nissan Sunny 1.6 St. Car | reyður, árg. 1993. 5 hurðar, km. 146.000 | 39.000 |
| Opel Vectra 1.7 Diesel | reyður, árg 1995, 4 hurðar, km. 118.000 | 76.000 |
| Nissan Almera 2.0 D GX | grønur, árg. 1996. 5 hurðar | 89.000 |
| Opel Vectra 2.0 Diesel St. Car | bláur, árg 1997, 5 hurðar | 125.000 |
| Nissan Cabstar Diesel Lastbilur | reyður, árg. 2000. 2 hurðar | 135.000 |
| Saab 9-3 TiD | bláur, árg 2000, 5 hurðar, km. 67.000 | 208.000 |
| Peugeot 106 Diesel | bláur, árg 1997, 3 hurðar, km. 128.000 | 65.000 |
| Audi A4 Tdi | bronze, árg 1995, 4 hurðar, km. 135.000 | 130.000 |
| Peugeot 106 Diesel | gráur, árg 1999, 3 hurðar, km. 60.000 | 85.000 |
| Mitsubishi Pajero TD Van | hvítur, árg 1987, 3 hurðar, km. 165.000 | 22.000 |
| Peugeot 306 DT 1.9 | grønur, árg 1996, 4 hurðar, km. 163.000 | 75.000 |
| Citroen Berlingo 1.9d Van | bláur, árg 1997, 4 hurðar, km. 160.000 | 65.000 |
| Peugeot 406 ST 2.0 Hdi | vínreyður, árg 1999, 4 hurðar, km. 120.000 | 164.000 |
| VW Polo Station Car Dies. | grønur, árg 1999, 5 hurðar, km. 45.000 | 110.000 |
| Peugeot 607 Hdi 2.2 Aut. | gráur, árg 2001, 4 hurðar, km. 105.000 | 275.000 |
| Ford Escort 1.6 | grønur, árg 1995, 4 hurðar | 52.000 |
| Opel Astra 1.7DT | brúnur, árg 1996, 4 hurðar | 75.000 |
| Ford Escort 1.8 Diesel | grønur, árg 1995, 4 hurðar, km. 152.000 | 65.000 |
| Opel Astra 1.7DT Van v/mvg | bláur, árg 1998, 5 hurðar, km. 82.000 | 78.000 |

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

**P/F Meinhardt Arge**
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr**. Sp/f 580, Sp/f Johannes Andreasen, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:**
19.12.2002.
**Nevnd:**
**Farin úr nevndini:** Per Andreasen, Dalavegur 47, 100 Tórshavn (formaður), Arne Johannes Andreasen, Viðargøta 34, 160 Argir og Kári Andreasen, Svalbardsvegur 16, 100 Tórshavn.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Arne Johannes Andreasen, Viðargøta 34, 160 Argir.
Innkomnir sum stjórar: Per Andreasen, Dalavegur 47, 100 Tórshavn og Kári Andreasen, Svalbardsvegur 16, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:**
Felagið verður teknað av einum stjóra.

*Skráseting Føroya tann 13. februar 2003*

*Kristin Balle*




**JARÐFRØÐISAVNIÐ**
Faroese Geological Survey

# Jarðfrøðingur/ jarðalisfrøðingur

## - avloysarastarv á Jarðfrøðisavninum

Lýst verður eftir avloysara fyri jarðfrøðing í barnsburðarfarloyvi í 7 mánaðar (kann gerast longri) at byrja skjótast til ber.

**Starvið**
Setanin er á kanningardeildini á Jarðfrøðisavninum. Her skal avloysarin hjálpa til við teimum dagligu uppgávunum, sum eru fjølttáttaðar og ofta verða loystar í tvørfakligum arbeiðsbólkum innan og tvørturum deildarmark. Ein av seruppgávunum, ið avloysarin skal hjálpa til við, er at byggja upp ein dátugrunn við upplýsingum um fysisku, kemisku og bygnaðarligu eginleikunum í basaltinum, sum kunnu hava týdning fyri oljuleitingina kring Føroyar. Aðrar uppgávur fevna eitt nú um tulking av seismiskum og petrofysiskum kanningartilfari frá oljuleitingunum.

**Krøv til umsøkjaran**
Setanin krevur eina geovísindaliga útbúgving á universitetsstøði. Fyrimun hava umsøkjarar við royndum innan nýtslu av teldutøkni í sambandi við loysn av jarðfrøðiligum spurningum, og við góðum samstarvsevnum og fakligum smidleika.

**Setanarviðurskifti**
Vit bjóða eitt spennandi, avbjóðandi og sjálvstøðugt starv í einum lítlum, men fjølttáttaðum fakumhvørvi við tøttum tilknýti til oljuleitingarvirksemið øðrumegin, og til føroysku oljumyndugleikarnar hinumegin.

Lønin er sambært sáttmála millum avvarðandi fakfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn**
Umsóknir við hjáløgdum CV, avriti av embætisprógvi, frágreiðing um arbeiðsroyndir v.m., skulu vera Jarðfrøðisavninum í hendi í seinasta lagi 1. mars 2003. Adressan er:

**Jarðfrøðisavnið**
postsmoga 3169, 110 Torshavn

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til: Martin V. Heinesen, stjóra, tel. + 298 357002, t-bræv martinh@jfs.fo, ella Claus Andersen, deildarstjóra, tel. + 298 357009, t-bræv claus@jfs.fo.

*Jarðfrøðisavnið er vísindaligur kanningarstovnur undir Oljumálaráðnum og virkar í kolvetnisumsitingini somuleiðis sum samskipaður partur av stýrinum við ábyrgd fyri øllum jarðfrøðiligum viðurskiftum.*

*Jarðfrøðisavnið hevur til endamáls at savna, varðveita, handfara og breiða út kunnleika um viðurskifti av týdningi fyri gagnnýtslu og varðveitslu av landsins jarðfrøðiligu náttúruvirðum. Stovnurin skal virka fyri, at lóggáva og umsiting av jarðfrøðiligum náttúruvirðum verður grundað á framkomna og dagførda jarðfrøðiliga vitan.*




# Sølu- og avgreiðslufólk

Starvsfólk søkist til fjølbroytt arbeiði, ið umfatar sølu, kundarøkt og avgreiðslu.

Umsøkjarin skal vera fyrikomandi, hava teldukunnleika á brúkarastøði, og somuleiðis verða handaligur.

Skrivlig umsókn við møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 01.03.03.

Starvssetan skjótast til ber.

**INVENTAR TÆNASTAN**

Heygsvegur 23
Postsmoga 1002
FO-110 Tórshavn

Tlf. +298 35 38 00
Fax + 298 35 38 01
inventar@inventar.fo
www.inventar.fo

# Mitsubishi Pajero 2.5 TD



árg. 88, km 173.000, nýliga høvuðsumvaldur.
Til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 213046**